**Bjørn Kalsø**
**Bárður Nielsen**
**Kaj Leo Holm Johannesen**
**Edmund Joensen**
**Magnus Rasmussen**
**Magni Laksáfoss**
**Bill Justinussen**
**løgtingsmenn**

**Broytingaruppskot**
**til**
**3. viðgerð av**

**løgtingsmáli nr. 18/2017: Uppskot til løgtingslóg um fyrisiting av sjófeingi**

**b r o y t i n g a r u p p s k o t**

**1.** § 7, stk. 2, nr. 4 verður orðað soleiðis:
"4) eigararnir av í minsta lagi 2/3 av øllum eginpeninginum, herundir partapeninginum, sum somuleiðis eiga í minsta lagi 2/3 av øllum atkvøðurættinum og avgerðarrættinum í felagnum, skulu vera heimahoyrandi í Føroyum og skulu lúka treytirnar í § 6,"

**2.** § 7, stk. 7 verður strikað.

**3.** Í § 9, stk. 3 verður ", hóast ásetingarnar í § 7, stk. 2, nr. 4 og 5. Felag, ið ikki lýkur treytirnar í § 7, stk. 2, nr. 4 og 5, kann tó bert halda fram, um eigarar av í minsta lagi 2/3 av eginpeninginum, herundir partapeninginum, umframt ábyrgdarpeninginum, sum somuleiðis eiga í minsta lagi 2/3 av atkvøðurættinum og avgerðarrættinum í felagnum, lúka treytirnar í § 6, stk. 2. Tá partabrøv ella kapitalpartar verða seldir, skulu treytirnar í § 7, stk. 2, nr. 4 vera loknar. Avtala um skuld, sum ikki er í samsvari við § 7, stk. 2, nr. 5 kann ikki gerast eftir, at henda løgtingslóg er komin í gildi" strikað.

**Viðmerkingar**
Til nr. 1
Loyvt verður, at útlendingar kunnu eiga 1/3 í fiskivinnuni, eins og í dag.
Til nr. 2 og 3
Kravið um, at útlendingar skulu úr fiskivinnuni, verður strikað.

**Á Løgtingi, 12. desember 2017**

Bjørn Kalsø Bárður Nielsen Edmund Joensen

Magnus Rasmussen Kaj Leo Holm Johannesen

Magni Laksáfoss Bill Justinussen